# BILATORGIÐ

**Føroyski brúktbilamarknaðurin - í Sosialinum hvønn hósdag**

Fyrivarni verður tikið fyri villum



**NISSAN PRIMERA 2.0 SLX**
Árg 1992, Km 170.000.
Kr. 79.000.



**NISSAN PRIMERA 1.6 PLAYER**
Árg 1995, Km 99.000.
Kr. 89.000.



**PEUGEOT 309 GR 1.6**
Km 180.000.
Kr. 15.000.



**NISSAN PRIMERA LX 4/H**
Árg 1995, Km 80.000.
Kr. 89.000.



**OPEL CORSA 1.4 SWING**
Árg 1998,
Kr. 90.000.



**OPEL ASTRA 1.6 CARAVAN**
Árg 1995, Km 98.000.
Kr. 69.000.



**FIAT CHINQUECENTO SPORTING**
Árg 1998, Km 25.000.
Kr. 65.000.



**OPEL VECTRA**
Árg 1996, Km 84.000.
Kr. 105.000.



**NISSAN PRIMERA 1.6 LX 4/H**
Árg 1996, Km 130.000.
Kr. 105.000.



**OPEL OMEGA 2.5 V6**
Árg 1996, Km 65.000.
Kr. 135.000.



**PEUGEOT 806 HDI VAN**
Árg 2000, Km 26.000.
Kr. 195.000.



**NISSAN KING CAB 2.5 DIESEL**
Árg 1995, Km 100.000.
Kr. 98.000.



**NISSAN ALMERA 2,0 DIESEL**
Árg 1997, Km 105.000.
Kr. 110.000.



**NISSAN KING CAB 2500 DIESEL**
Árg 1996, Km 80.000. 4x4.
Kr. 120.000.



**NISSAN ALMERA 2.0 D 5/H**
Árg 1997, Km 75.000.
Kr. 110.000.

**NISSAN PRIMERA 2.0 4/H**
Árg 1997, Km 47.000.
Kr. 130.000.

PEUGEOT NISSAN P/F **Meinhardt Arge**
Tel 345400 nissan@nissan.fo heimasíða: www.nissan.fo



**TOYOTA COROLLA**
Árg jul.89, Km 200.000.
Kr. 22.000.



**NISSAN PRIMERA H/B**
Árg 1997, Km 52.000. við 4 eykahjólum.
Kr. 139.000.



**PEUGEOT 306 DIESEL**
Árg jun.95, Km 107.000. Kr. 93.000.



**VW POLO CLASSIC SDI**
Árg nov.96, Km 85.000.
Kr. 98.000.



**VW PASSAT 1.6 SEDAN**
Árg 1986, Km 143.000.
Kr. 24.000.

Audi SEAT
**Bilasølan v/ Øssur Johannesen**
**tel 315354 - www.audi-vw.net**



**VW GOLF 1.9 SDI**
Árg 96, Km 177.000. Diesel 64 hk.
Kr. 99.800.



**MAZDA 323 P 2.0 DIESEL**
Árg 99, Km 18.000. 71 hk.
Kr. 109.800.



**VW GOLF 1,9 TD**
Árg 96, Km 167.000. 75 hk . Kr. 129.800.



**VW GOLF 1,9 TDI GT**
Árg 96, Km 140.000. 90 hk.
Kr. 129.800.



**VW GOLF 1.9 TDI AUT.**
Árg 97, Km 132.000. 110 hk automatgear.
Kr. 139.800.

**SP/F AUTOIMPORT**
Bilasøla, eykalutir, plátu- og lakkverkstaður
FO-416 Signabøur
Tel. 421560 - 217778 -218778



**TOYOTA CARINA LIFTBACK**
Árg 1991, væl viðfarin, bert ein eigari, útgjald kr.13.000,- rest kunnu vit tosa um. Kr. 48.000.



**BMW 525I AUTOMATIC**
Árg 1997, sera væl viðfarin. Hesin er ikki innfluttur sum brúktur.. .



**TOYOTA COROLLA 3/H**
1ára gamal, bilurin sum nýggjur. .

FIAT
**Bilfríðkan**
Velbastaðvegur 78
**Tel. 317300 ella 217300**

**Sosialurin**
-tað loysir seg



**NISSAN PATROL 4.2 DIESEL**
Árg 1989, Km 245.000. Hevur setur aftan, skrásettur sum persónbilur.
Er nýsýnaður og hevur m.a. júst skift forhjólslegur. Kr. 85.000.
*216409*



**AUDI A4**
Árg jul.96, Km 65.000. Bilurin er í sera góðum standi og sær út sum nýggjur.
*373943 - 282843*

## TIL SØLU



Mercedes-Benz Sprinter 412D frá 12/99 til sølu um hóskandi boð fæst.

- Hevur koyrt 19.400 km.
- Eykaútstýr: sperra á bakhjólunum.
- Píkadekk og ketir fylgja við.

**Langasandur Timburhandil**
Tel 42 15 85 / 28 60 10 / 22 66 61



# Búskaparligi vøksturin framvegis stórur

**– Fyrst og fremst eru tað støðugi fiskiskapurin og avbera góðu fiskaprísirnir, sum seta ferð á inntøkuvøksturin, sigur Búskaparráðið í várfrágreiðingini**

BÚSKAPUR
*Eirikur Lindenskov*

– Framvegis er stórur búskaparligur vøkstur. Enn heldur Búskaparráðið vøksturin yvirhøvur vera væl grundaðan og at almenni búskaparpolitikkurin ikki skundar ov mikið undir vøksturin. Tó sýnist tað, sum átti tað almenna at tátta í samanløgdu byggiíløgurnar hjá kommunum, landi og almennum fyritøkum, sum saman við privata byggihuginum er í ferð við at uppbrúka útboðið í byggivinnuni.

Hetta sigur búskaparráðið m. a. í várfrágreiðingini, sum varð almannakunngjørd í gjár. Víðari sigur Búskaparráðið:

– Er búskaparvøksturin eina grundaður á góðan byr í veiðu og fiskaprísum og álitið hjá brúkarum og investorum á framtíðarútlitini, er lítið at óttast fyri. Men kortini skulu tað almenna, fyritøkurnar og brúkararnir ikki hava ov mikið bjartar vónir um framtíðina, tí ov vágin atburður kann koma okkum aftur um brekku seinni.

Fyrst og fremst eru tað støðugi fiskiskapurin og avbera góðu fiskaprísirnir, sum seta ferð á inntøkuvøksturin. Høgu útflutningsinntøkurnar skapa rúm fyri økta innflutninginum, sum stendst av inntøkuvøkstrinum. Haraftrat kemur øktur innlendskur eftirspurningur, bæði til nýtslu og íløgur, sum eisini er við til sjálvstøðugt at seta ferð á vøksturin.

### Øktur íløguhugur

Hallið á handilsjavnanum í fjør var ikki annað enn væntandi, tí at skipainnflutningurin øktist munandi, og útlit eru helst til, at økti íløguhugurin fer at síggjast aftur sum handilsjavnahall nøkur av komandi árunum. Handilsjavnahallið er kortini einki at óttast, um íløgurnar eru grundaðar á, at tær kunnu bera seg undir marknaðarligum korum.

Búskapurin er einstáttaður og tí sera viðbrekin. Broytingar í altjóða marknaðarviðurskiftum ella fiskiskapi kunnu geva okkum stórar trupulleikar. Prísfall á rækjumarknaðinum, støðugt høgir oljuprísir, viknaðir fiskastovnar, eitt nú hýsa og svartkjaftur, sjúkur í alifiski - slíkar hendingar kunnu fáa álvarslig árin á búskaparligu gongdina. Ov intensivur fiskiskapur, óhapp ella óansni í alingini, altjóða marknaðarbroytingar og tilvildarlig náttúrlig fyribrigdi kunnu raka ein so lítlan og einstáttaðan búskap sum okkara sera meint. Hetta ger, at skilagóð skipan av marknaðunum og eftirlit við at vinnureglurnar verða hildnar, eru alt meira átroðkandi fyri at tryggja, at vit ikki sjálvi skapa trupulleikarnar.

Tað eru tvinni serlig viðurskifti, Búskaparráðið hesa ferð vil leggja dent á. Annað er meting um kappingarførið, sum verður umtalað í seinna parti av frágreiðingini. Hitt er at okkum manglar tær mest vanligu hagtalsligu uppgerðirnar av búskapinum til at byggja hollar búskaparlýsingar á.

### Tekin um kappingarføri

At miðal mánaðarliga lønarútgjaldingin upp á fólkið í ali- og kryvjivirkjum og á flakavirkjum er vaksin eins nógv ella meira enn í flestu øðrum vinnum, er tekin um, at virkisbúskaparliga kappingarførið hjá virkjum í útflutningsvinnuni hevur verið á góðari leið. Støðugt høgu avreiðingarprísirnir eru somuleiðis tekin um, at virkini megna at standa seg undir hesum treytunum eisini. Eftir øllum at døma eru flakavirkini komin væl ígjøgnum tillagingina til høgu fiskaprísirnar og skipanina við kapping á fiskamarknaðinum. Somuleiðis sær út til at ali- og kryvjivirkini eru før fyri at kappast á heimsmarknaðinum undir teimum treytum, sum føroyskt lønarlag setir.

### Eigur at klára seg í kapping

Tað er ikki rætt at seta tiltøk í verk fyri at verja hesar partarnar av útflutningsvinnuni, tí slík tiltøk verða meira skaðilig enn gagnlig. Er búskaparliga gongdin annars grundað á skilagóð viðurskifti, eigur virkingarliðið í útflutningsvinnuni at klára seg í kapping við aðrar vinnur um arbeiðsmegi, kapital og tilfeingið annars. Tað er produktiviteturin í øllum vinnum, sum er avgerandi fyri vælstandin hjá brúkarunum, ikki virkisbúskaparliga kappingarførið hjá útflutningsvinnuni.

At vit ikki hava tað stóru nøgdina av liðugt framleiddum vørum og ikki síggja tann stóra vøksturin í tí framleiðsluni, vísir helst, at komparativu fyrimunirnir vit hava, er rávøruframleiðsla og framleiðsla av ávegis virkaðum vørum til ídnað í øðrum londum.

Vaksandi eftirspurningurin kann føra til inflasjón, tá innlendska útboðið ikki megnar at fylgja við. Strukturtrupulleikarnir, Búskaparráðið áður hevur víst á, kunnu gera støðuna upp aftur verri. Her verður t.d. hugsað um samdøgursfrádráttin fyri at fara av landinum at arbeiða, sum minkar um útboðið av arbeiðsmegi innanlands, frítøka fyri MVG í eitt nú byggivinnuni, sum í ein ávísan mun lækkar prísin og tessvegna økir eftirspurningin, skattalættin til fiskimenn og kostnaðarleys fiskirættindi, sum skapa størri eftirspurning frá hesum pørtum. At rætta hesar skeivleikar hevði bøtt um aktuellu støðuna, samstundis sum tað yvirhøvur er gagnligt fyri búskapin sum heild.

Við teimum metingartólum vit í dag hava, er álitið á konjukturanalysurnar tó ikki av tí besta. Vit hava ikki nóg góð líkindi at meta um prísgongdina, m.a. tí at enn er nýggja prístalið ikki farið at virka. Av hesi orsøk vita vit ikki um órógvandi inflasjón er farin at gera seg galdandi á nøkrum økjum. Vit hava ikki álítandi tjóðarroknskap og heldur ikki álítandi gjaldsjavnauppgerð at byggja metingarnar um heildargongdina á. Av hesum stendst, at vit í veruleikanum ikki hava nóg góða vitan um, hvussu búskaparvøksturin av sonnum er, hvussu íløgugongdin er, ella hvussu viðskifti okkara við umheimin hilnast. Hetta mugu myndugleikarnir fáa loyst, so at vitanin um búskaparligu gongdina kann gerast nóg álítandi til at gera haldgóðar metingar og - grundað á vitanina og metingarnar – byggja búskaparpolitikkin á.

## Um Búskaparráðið

Búskaparráðið er sett sambært løgtingslóg nr.120 við seinni broytingum um búskaparráð. Tað ráðið, sum nú situr, er sett at virka frá 1. januar 2000 til 31. desember 2002. Limir ráðsins eru:

Vald eftir grein 2a. (formansskapurin):

Hermann Oskarsson, cand. polit, stjóri á Hagstovu Føroya, formaður

John P. Danielsen, cand. polit., fíggjarstjóri á SEV

Una Joensen, cand. oecon., Føroya Tele

Vald eftir grein 2b:

Marner Jacobsen, cand. oecon., forstjóri í Føroya Sparikassa

Anfinn Olsen, reiðari

Anna Kass, M.Sc. í búsk., fíggjarfulltrúi í Undirvísingar- og Mentamálastýrinum

Elisabeth Gaardbo, siviløkonom, stjóri í ALS

Skrivari hjá ráðnum er Jóannes Jacobsen, cand. oecon.



**HYUNDAI ACCENT**
Árg 2000, Km 15.014. v/ aircondition.
Kr. 108.000.



**HONDA CIVIC 1.5I VETEC**
Árg 1999, Km 31.000.
Kr. 125.000.

**BMW 520I 6 SYL.**
Árg 1989, Km 312.000.
renoveraðan motor.
Kr. 85.000.

**SUBARU**
Árg 1989, Km 134.000.
Kr. 10.000.

**TOYOTA COROLLA 4/H**
Árg 1995, Km 97.000.
Kr. 90.000.

**FORD FIESTA CLASSIC**
EM670
Árg 1996, Km 56.000.
Kr. 60.000.



**HYUNDAI STELLAR 2.0**
Árg 1987, Km 115.000.
Kr. 15.000.



**HYUNDAI SONATA 2.0**
Árg 1997, Km 48.000.
Kr. 110.000.



**HONDA CIVIC 1.4 I S**
Árg 1997, Km 22.000.
Kr.115.000.

**OPEL ASTRA 1.6**
Árg 1996, Km 117.000.
Kr. 90.000.

**HYUNDAI SONATA 2.0**
Árg 1998, Km 75.000.
Kr. 115.000.



**KIA CLARUS 2.0**
Árg 1997, Km 45.000.
Kr. 105.000.

HONDA

**HONDA CIVIC**
Árg 1997, Km 36.000.
Kr. 115.000.



**TOYOTA CARINA**
Árg 1989, Km 153.000. Hevur sera gott stereoanlegg, næstan nýggj vetrardekk á felgum fylgja við.
Kr. 65.000.

**VW PASSAT**
Árg 1989, Km 168.000.
Kr. 70.000.

**FORD TRANSIT AUT.**
Árg 1989, Km 81.000.
Kr. 70.000.



**MAZDA 2,2 DIESEL**
Árg 1996, Km 33.000.
Kr. 95.000.



**HYUNDAI ATOS 1.0**
Árg 1999, Km 24.000.
Kr. 80.000.

HYUNDAI

**NORDBIL v/ Oyggjarvegin tel 313707**